# Amager vann á útivølli

Fremad Amager vann leygardagin útidystin ímóti Stenløse í 2. deild eystur. Fremad Amager byrjaði dystin betur, og Andreas Mortensen og Anders Jochusem løgdu liðið á odda 2-0. Stenløse svaraði aftur beint fyri steðgin, so at støðan var 2-1 í hálvleikinum. Tann støðan helt sær til fram móti dystarenda, tá ið Andreas Mortensen skoraði til úrslitið 3-1. Fremad Amager liggur á næstfremsta plássinum í deildini.



# Blackpool spældi javnt

Enska 1. deildarfelagið Blackpool spældi leygardagin ímóti Burnley á útivølli, og dysturin endaði við javnleiki. Tá ið liðini fóru til hálvleik, var einki mál komið. Hetta broyttist í seinna hálvleiki, tí Burnley legði seg á odda eftir 52 minuttir. Blackpool javnaði við brotssparki, tá ið stívliga eitt kort var eftir at spæla. Tá ið Burnley skoraði til 2-1 fimm minuttir fyri tíð, líktist tað sigursmálinum, men í yvirtíðini eydnaðist tað Blackpool at javna til 2-2. Claus Bech Jørgensen spældi ikki við hjá Blackpool í hesum dystinum.

# Mótstøða í heimsflokki

**Tað var ikki eiti á mótstøðu, sum knørradreingirnir fingu í Danmark, tá teir í finaluni máttu lúta fyri bæði olympiskum meistarum og heimsmeistarum**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað gekk væl hjá bæði føroysku dreingjunum og føroysku gentunum í rógvikappingini í Brabrand um vikuskiftið. Kvinnur vunnu tann fyrsta róðurin í fýra mans innriggarunum, og so var tíðin komin til dreingirnar at royna seg.

Sjálvt um tað ikki gekk eins væl hjá dreingjunum, sum tað gekk hjá gentunum, so var teirra innsatsur tó væl og virðiliga góðkendur. Teir megnaðu í fyrsta umfari at rógva seg víðari til finaluumfarið, men her blivið teir ov stuttir.

Av teimum seks bátunum í finaluni endaði knørradreingirnir nummar fimm, men tað er tó einki merkiligt í, at teir ikki megnaðu at vinna. Mótstøðan hjá teimum var nevniliga rættiliga hørð.

Av tí at kappingin hjá útriggarunum bleiv avlýst, so var tað stórur partur av eliturógvarunum í Danmark, sum valdu at royna seg í innriggarum í staðin, og tá var ikki lætt.

## Olympiskur meistari vísti vegin

Og sum sagt, so var tað ikki ein og hvør innan rógving, sum var í vinnandi bátunum hjá dreingjunum leygardagin. Stýrimaðurin var eingin minni enn Katrin Olsen, sum hevur fingið sera nógv góð úrslit kring heimin, meðan menninir handan árarnar bæði hava vunnið olympisk gullheiðursmerki og heimsmeistaraheitið í fleiri umførum.

Ein av monnunum á vinnandi bátinum var Eskild Ebbesen, sum tvær ferðir hevur verið við til at vinna olympiskt gull á danska bátinum, sum vanliga verður róptur “gullfýrarin.”

Ein annar olympiskur gullvinnari var eisini at finna umborð. Her var talan um Thomas Ebert, sum eisini hevur roynt at vunnið olympiskt gull saman við Eskild Ebbesen umborð á “gullfýraranum.”

Og hinir báðir menninir umborð á vinnandi bátinum vóru heldur ikki hvørjir sum helst. Her var talan nevniliga um Rasmus Kvist og Mads Rasmussen, sum fyri bert tveimum vikum síðani endurvunnu heimsmeistaraheitið í tvey mans útriggarum.

So sjálvt um føroysku dreingirnir ikki vunnu sín róður í Danmark, so vóru teir sera væl nøgdir. Teir hildu tað vera serliga stuttligt at rógva ímóti so sterkum rógvarum sum teimum, teir møttu í finaluni.



*Tvífaldi olympiski gullvinnarin, Eskild Ebbesen, var ein av rógvarunum á vinnandi bátinum hjá monnum, har føroyska Katrin Olsen eisini stýrdi.*
*Mynd: Tór Tungá*

# Katrin var stóri sigursharrin

**Føroyski rógvarin, Katrin Olsen, gjørdist stóri sigursharrin í rógvikappingini í Brabrand um vikuskiftið, tá hon vann bæði gull hjá kvinnum og monnum ávikavist sum rógvari og stýrimaður**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Danmarksmeistaraskapurin í rógving, sum skuldi vera um vikuskiftið, bleiv ikki hildin orsakað av keðiliga veðrinum. Men av tí at so nógvir rógvarar úr bæði Danmark og Føroyum vóru møttir til kappingini, valdu fyrireikararnir tó at skipa fyri einari kapping, so nógvu rógvararnir sluppu ein túr út á vatnið.



*Mest vinnandi rógvarin í kappingini í Brabrand var ein føroyingur. Katrin Olsen vann nevniliga bæði kappingini hjá kvinnum og monnum ávikavist sum rógvari og stýrimaður.*
*Mynd: Tór Tungá*

Fyrireikararnir valdu at strika kapppingina hjá útriggarunum, og tí vóru tað bert fýra mans innriggarar, sum vóru við í kappingini. Hetta gjørdi, at føroyska manningin úr Knørrafelagnum var noydd at finna tvær aðrar kvinnur at rógva saman við teimum, men hetta gjørdist tó ikki tann stóri trupulleikin.

Katrin Olsen og Hildur Enni, sum fyrr hava róð við Jarnbardi, fóru báðar at rógva við føroyska bátinum, og henda samansetingin vísti seg at rigga væl. Føroyski báturin vann nevniliga gull í kappingini hjá kvinnum, og so var fyrsta gullmerkið hjá Katrin Olsen komin í hús.

## Katrin vann eisini hjá monnunum

Sjálvt um tað bert vóru tvær kappingar á skránni henda dagin – ein hjá kvinnum og ein hjá monnum – so eydnaðist tað Katrin Olsen at vinna gullheiðursmerki í báðum róðrunum.

Hjá monnunum skuldi hon nevniliga verið stýrimaður á tí eina bátinum, og hetta gekst eisini sera væl. Í innleiðandi umfarinum megnaðu tey at rógva seg í finaluna, og sjálvt um kappingin var hørð í finaluni, so megnaðu Katrin og teir fýra menninir á hennara báti at vinna róðurin, og sostatt gjørdist Katrin stóri sigursharrin henda dagin, tá ið hon vann báðar róðrarnar.